# Rógvi sum súkklari og model

*Fyri stuttum slapp fremsti súkklari okkara, Rógvi Johansen, at royna ein eitt sindur øðrvísi starvsdag, tá hann brádliga skuldi royna seg framman fyri myndatólinum, ístaðin fyri at royna seg á hjólhestinum*

JÁKUP MØRK

35 ára gamli Rógvi Johansen man helst vera millum bestu, um ikki tann besti, súkklararnar, sum vit hava havt her á landi.

Seinastu árini hevur hann verið í Danmark og roynt seg, og eyðsæð er, at hann hesa tíðina hevur gjørt rættuliga stór framstig, og er hann í dag at finna millum bestu súkklararnar í Danmark.

Orsøki til at hann í sínari tíð fór niður, var, sum hjá so mongum útbúgvingarørindi, við tað at hann í løtuni lærur til myndamann. Harumframt sá hann eisini hetta sum ein góðan møguleika til at gera meira við súkklingina, og úrslitini av hesum hava ikki ligið eftir.



*Sum vera man, so varð nógv gjørt burturúr, áðrenn myndamaðurin slapp framat. Her er tað húðin,sum fær eitt sindur av smyrsli*

### Skifti síðu

Í samband við útbúgving sína er tað sjálvsagt javnan komið fyri, at Rógvi hevur tikið myndir av einhvørjum, sum er farið fram, men fyri stuttum slapp hann so eisini at royna, hvussu tað er at standa hinumegin myndatólið.

Tað var nevnliga soleiðis, at hann í einum donskum blað skuldi verða avmyndaður sum »månedens mand«, og sum vera man, varð nógv gjørt burturúr, tá hann soleiðis skuldi royna seg sum model í eitt samdøgur.

Áðrenn farið var til verka greiddi hann frá, hvørja bakgrund hann hevði, eins og hann eisini greiddi frá, at hann vanliga syrgdi fyri, at súkkli- og fotoútgerð hansara var »up to date«, men at hann ikki var heilt so stinnur, tá tað kom til at lata seg í eftir mótanum. Her var tó einki við at stilla seg framman myndatólið í gomlum slitnum buksum og kanska eitt sindur av gele í hárinum.

Bæði klæðir, húð og hár varð gjørt til av fólki við serkunnleika um evnið, og hóast tað kanska kann tykjast eitt sindur ógvusligt fyri ein vágbing, sum vanliga ikki leggur so nógv í, hvussu hann gongur ílatin, ella hvussu hárið situr.

Sjálvur helt Rógvi eisini, at hetta var kanska ov nógv av tí góða, men eftir at alt var fingið upp á pláss, dámdi honum kortini bara heilt væl.

Sjálvur greiddi Rógvi m.a. soleiðis frá í blaðnum:

- Eg eri væl nøgdur við úrslitið eftir viðgerðina. Í 15 ár havi eg trimmað hárið, so tað hevur verið lætt at fáast við, men eftir at hava fingið nýtt hársnið, havi eg fullkomuliga broytt hugburð. Eg havi ongantíð áður roynt at smyrja húðina við ymsum smyrsli o.ø. Hetta var tó gott at royna, og satt at siga eri eg eisini freistaður at fylgja teimum ráðum, sum eg havi fingið í so máta.

- Klæðini frá Richson vóru eisini øgiliga góð. Serliga dámdi mær væl marlboroklæðini við gulu skjúrtini. Mær hevur altíð dámt væl gult, og allar mínar súkklur eru gular. Eisini kenni eg meg væl í klædninginum, men hóast alt helt eg, at eg klæddi best hini bæði settini, í hvussu so er, tá talan er um gerandisklæði.

Yvirhøvur havi eg fingið nógv burturúr hesum degnum, og eg havi fingið alla ta vegleiðing og øll tey góðu ráðini, sum eg hevði vónað at fáa.

Rógvi hevur so beinasamur at lænt okkum myndirnar, sum vóru at síggja í blaðnum, og á hesari síðu síggjast so nakrar teirra.

### Í eldin aftur

Annars fer ikki at ganga lang tið, áðrenn Rógvi og teir í hansara felagi aftur skulu út á donsku vegirnar at royna seg.

Rógvi hevur sjálvur sagt, at hann fer at súkkla tey bæði árini, sum hann hevur eftir a útbúgving síni, men at hann síðani fer at hugsa meira um arbeiðið.

Havandi í huga, tað sum Rógvi hevur fingið á skaftið tey bæði seinastu árini, er tað kanska spell, at longu gevst um eini tvey ár, men hóast alt, so er hann tá komin fram við tey bestu árini á súkkluni, men hinvegin er hann tá farin upp tað, sum verður rópt besti aldurin hjá einum súkklara.



*Rógvi íløtin klæði av merkinum Diesel, sum Richson í City Vest hevur valt til hansara*



*- Klæðini frá Richson vóru eisini øgiliga góð. Serliga dámdi mær væl marlboroklæðini við gulu skjúrtini*



# Klaksvíkingar nærkast

*Eftir at klaksvíkingar vunnu stórsigur á sandavágsmonnum í fimta umfari er munurin upp til havnarmenn ikki stórur, og í botninum fingu kollfirðingar óvæntað trý kærkomin stig móti hvalvíkingum.*



CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Neyðugt varð hjá klaksvíkingum at vinna stórt móti sandavágsmonnum, og tað varð júst tað sum hendi. Úrslitið varð 3.5-0,5.

Rani Nolsøe vann við svarta fólkinum móti Torkili Nielsen. Talvið sum er við í blaðnum í dag, varð sera opið og áhugavert.

Á øðrum borði vann Ólavur Simonsen í enn einaferð eyðkendum stíli móti Bernhardi Augustinussen. Ólavur offraði finnu, fekk hana aftur samstundis sum hann forðaði Bernhardi at leypa í borg. Ólavur vann í roynd og veru talvið í byrjanini.

Steintór Rasmussen ætlar sær at vinna øll talvini í ár, og hesaferð varð tað Gutti Petersen sum varð við sviðið soð. Gutti fór í longu borg og skjótt peikaði bæði bispur, riddari og frúgv hjá Steintóri móti kongastøðuni hjá Gutta. Steintór offraði kvalitet fyri hetta álop sum eisini gav úrslit.

Á fjórða borði var søgan ein heilt onnur. Tummas M. Anthoniussen og Heri Christoffersen leiktu javnleik í einum talvi, har Heri bjóðaði Tummasi javnleik fleiri ferðir. Tummas átti at vunnið í byrjanini, men misti seinni kvalitet og var heldigur at fáa javnleik.

### Toftamenn knáir

Havnarmenn ætlaðu sær stórsigur mótu toftamonnum, men vóru hepnir at vinna dystin. Havnin vann 2,5-1,5.

Carl Eli Nolsøe Samuelsen og Jens Christian Hansen samdust um javnleik longu eftir fjúrtan leikir. Lítið er at siga um talvið, men eitt er sikkurt og tað er, at sigurin kundi fara báðar vegir, um telva varð víðari. Jens Christian hevur leikt øll fimm talvini javnt í liðkappingini.

Haldur Suni Johansen við hvíta fólkinum megnaði ikki at koppa Helga Joensen úr Toftum. Haldur fekk lítlan fyrimun, men hesin fyrimunur varð ov lítil til at vinna talvið. Helgi kom fyri seg og stóð í miðspælinum minst líka gott. Talvið endaði javnt.

Herluf Hansen úr Havn hevur vunnið øll fimm talvini í ár, og hesaferð vann hann móti Wenzeli Højgaard. Herluf fekk góða støðu við svarta fólkinum, men hevði einki avgerandi. Wenzel helt leingi støðuna saman, men kom í svára tíðarneyð og bleiv øllum rokinum mátaður.

Á fjórða borði hevði Martin Poulsen úr Havn hvalbiarprestin yvir av sær. Hvalbiarprestur hevur ikki telva í fleiri ár, men tað sigst at hann hóast alt hevur hildið telvingina við líka, og tað sást aftur í talvinum móti Martini. Talvið endaði javnt, men hvalbiarpresturin fekk fyrimun í miðspælinum og átti helst at vunnið. Men javnleik móti so frægum telvara sum Martin er heiðurligt og gott úrslit hjá hvalbiarpresti.

### Kollfirðingar vinna

Ikki hevur liðkappingin í ár hilnast væl hjá kollfirðingum, men í felagsumfarinum í Klaksvík stóð ikki á. Teir møttu bert við trimum monnum, og hetta viðførdi, at Martin Brekká úr Hvalvík vann á fyrsta borði uttan dyst. Á hinum borðunum vunnu kollfirðingar.

Á øðrum borði vann Hans Kristian Simonsen heldur óvæntað móti Finnbjørni Zachariassen. Finnbjørn gjørdi mistak í byrjanini, og eftir hetta var Hans Kristian allatíð við yvirlutan. Hann vann sannførandi.

Talvið á triðja borði millum Karl Louis Johannesen úr Kollafirði og Gunnar Joensen sá leingi út til at enda javnt. Ikki fyri í endaspælinum kom avgerð. Gunnar var óneyvir og mátti lúta.

Jógvan Martin Joensen, Kollafjørður, hevur verið á flatlondum í nøkur ár, men hevur ikki gloymt mannagongdina. Hann vann nevnliga móti Bergi Magnussen. Jógvan Martin varð trýstur mestapartinum av talvinum, men Bergur ofraði ov nógv, og bleiv móti endanum mátaður.

**Støðan eftir fimm umfør:**

| | |
|---|---|
| Havnin | 16,5 stig |
| Klaksvík | 15 |
| Toftir | 8 |
| Hvalvík | 8 |
| Sandavág | 6,5 |
| Kollafjørð | 6 |

Sum tað sæst á støðuni í fyrstu deild, er eingin ivi um hvør kappast um FM-heitið. Heili sjey stig eru frá annaðtil triðja pláss. Úrslitið hjá kollfirðingum økir um spenningin í botninum, og eru teir fullmannaðir, ja so kann talan vera um eitt triðja pláss hjá teimum tá alt er avtornað.

Næsta umfar verður avgerandi, tí tá bresta klaksvíkingar og havnarmenn saman í Klaksvík, og tá vilja feløgini bæði prógva hvørt felag veruliga er best.

### 2. deild

Tveir dystir vóru hetta vikuskifti: Klaksvík-Havnin 3 og Vestmanna-Runavík.

Havnin 3 vann ein tepran 2,5-1,5 sigur móti klaksvíkingum. Hesin sigur førkar Havnina hálvt stig framum Klaksvíkina, men er helst ikki nokk til at blanda seg í toppinum.

Vestmenningar vunnu heili 3,5-0,5 móti runavíkingum. Á fyrsta borði vildi Meinhard Danielsen úr Runavík ikki bakka fyri altjóða meistarinum John Rødgaard. Talvið varð sera drúgt, og ikki fyri farið var um sætta tíma gavst Meinhard. Objektivt sæð var talvið allatíðina javnt, men Rødgaard hevur helst mangan telva seg frá javnari støðu til vunna støðu, og tað varð júst tað sum hendi.

Hálva stigið runavíkingar fingu varð á øðrum borði, har Brandur Jacobsen leikti javnleik móti John Jacobsen, Vestmanna.

Samson Højgaard var aftur at síggja hjá vestmenningum, og hansara verk lá ikki eftir.

**Støðan eftir fimm umfør:**

| | |
|---|---|
| Vestmanna | 11,5 stig |
| Havnin 2 | 9 |
| Runavík | 7 |
| Havnin 3 | 6,5 |
| Klaksvík | 6 |

Líkt er til, at vestmenningar vera aftur at síggja í fyrstu deild komandi kappingar ár. Um Rødgaard telvar við hvørt umfar, verður ringt hjá kappingarneytunum at fylgja við.

### 3. deild

Bert ein dystur í triðju deild varð hetta vikuskifti, og hann var millum Havnina 4 og Klaksvík. Havnarmenn vunnu heili 4-0, og hava tískil lagt seg klárt á odda í deildini. Havnarmenn høvdu styrkt sær liðið við unglingaføroyameistarinum Olaf Berg. Hann vann móti veterananum Vagn Heldarskarð.

Havnin 5 liggur á øðrum plássi. Vestmenningar hava telva ein dyst minni enn havnarliðini, og kunnu tí taka annað plássi aftur frá Havnina 5, við at vinna stórt móti Róki í útsetta dystinum.

### Flóvin á ferð

Flóvin Tór Næs hevur um jóltíðir telva við í stórari opnari kapping í Groningen, Hollandi. Hendan kapping endaði gamlaárskvøld. Flóvin fekk ringa byrjan, hevði eitt skifti bert tvey stig eftir seks umførum, men reistist og endaði kappingina við 50% skoru, 5,5 av 11.

Flóvin sigur sjálvur, at hann er hampuliga væl nøgdur við avrikið, men kundi sjálvsagt verið eitt sindur betri. Hann fór eitt sindur upp í rating, og tá kann úrslitið ikki vera so galið.

Í løtuni er Flóvin niðri í Linares, Spania, har hann telvar við í einari stórari kapping. Hann hevur í skrivandi løtu telva trý talv og hevur tvey stig. Hetta er flott, og sunnudagin vann hann móti góðum finskum telvara, ið nevnist Olli Salmensu. Fyrsta umfar tapti hann móti sterkum stórmeistara.

Eftir hesa kapping sum endar 16. Januar, fer hann at taka sær av løttum í nakrar dagar, áðrenn hann síðst í mánaðinum fer til aðra kapping í Spaniu. Kappingin Flóvin í løtuni telvar í finnur tú á: **http://www.ciudadfutura.com/superajedrez/linares-2000.htm**

# Talvið hesa vikuna

*Hvítur : Torkil Nielsen (2070)*

*Svartur: Rani Nolsøe (2180)*

*FM 1. deild (5), 08.01.2000*



*Torkil Nielsen er annar parturin í talvinum hesa vikuna*

***Savnsmynd***

1.e4 d6
2.d4 Rif6
3.Bd3 **(Betri og vanligari er 3.Ric3)** g6
4.f4 Bg7
5.Rif3 0-0 **(5...d5 6.e5 Rie4 7.Ribd2=)** 6.h3 **(Kontrollerar g4)** 6...c5
7.c3 cxd4
8.cxd4 b5!? **(8...d5 9.e5 Rie4 10.Fb3=)**
9.Fe2 a6
10.0-0 Rih5?! **(Objektivt sæð er 10...e6 betri)**
11.Kh2 Ric6
12.g4 Rif6
13.Ric3 b4
14.Ria4 **(14.d5 bxc3 15.dxc6 Fb6=)** 14...Fa5!
15.b3 **(15.Bc2!? er áhugavert 15...Rixg4+ 16.hxg4 Bxg4 17.Fd3 Bxf3 18.Rxf3 Rixd4 19.Rh3)** 15...e5? **(Svartur hevur hendan møguleikan 15...Rixg4+ 16.hxg4 Bxg4-+ og svartur vinnur)**
16.dxe5 **(Betri er 16.fxe5 dxe5 17.d5 Rid4 18.Rixd4 exd4)** 16...dxe5
17.Be3 Rid4 **Riddarin dominerar sentrum (17...Rid7 18.Rac1 exf4 19.Bxf4=)** 18.Bxd4 exd4
19.Rac1 **(Veikari er 19.Rixd4 Rixg4+ 20.hxg4 Bxd4)** 19...Re8
20.Rc5?! **(Verri er 20.Rixd4 Rixg4+ 21.hxg4 Bxd4=, men 20.Ric5 hevði forða svørtum at útvikla seg)**
20...Fd8 21.Rfc1 Bb7 **Fær svartur e-finnuna?**
22.Rid2 Rid5! **(Svartur hevur nú fingið fyrimun)**
23.Ff3 Ric3 **(Riddarin hevur fingið sítt pláss!)**
24.Rixc3? **(24.Rc4!?= hevði helst hildið hvítu støðuni saman)**
24...bxc3
25.Rif1 Fe7
26.b4 Bxe4
27.Bxe4 Fxe4
28.Fxe4 Rxe4
29.Kg3 d3
30.Kf3 **(30.Rd1 Rd8 31.Kf3 Rxb4-+)** 30...Rae8 **(30...Rae8 31.g5 d2 (31...Rxb4 32.R1xc3 Bxc3 33.Rxc3-+) 32.Rixd2 Re3+ (32...cxd2 33.Rd1-+) 33.Kg2 Re2+ (33...cxd2 er nógv veikari 34.Rd1 Re2+ 35.Kg3-+) 34.Kg3 cxd2-**